## Dýrari at flúgva

Tað loysir seg ikki fíggjarliga hjá grønlendska flogfelagnum Air Greenland at flúgva rutu millum Keypmannahavn og Narsarsuaq, og tí hevur felagið gjørt av at hækka prísin á ferðaseðlunum, soleiðis at frá 2. apríl fer tað at kosta 1.500 kónur meiri at ferðast aftur og fram. Avgerðin fær politiska mótstøðu, og Siumut-politikarar í Suðurgrønlandi hava mælt landsstýrinum frá at góðkenna hækkingina, sigur útvarpið í Nuuk.



## Mærsk rindar endurgjald

Eftir fimm ára togan hevur leiðslan á Mærsk-skipasmiðjuni Lindø játtað at rinda einum starvsmanni 2,2 mió. krónur fyri skaða, sum maðurin fekk í ryggin. Tá málið var fyri, skrivaði arbeiðsformaðurin á skipasmiðjuni, at maðurin hevði fingið skaða av at bera tung málingablikk, men hesum trúði skaðanevndin ikki. Veruleikin var eisini, at maðurin fekk skaða, tá hann hjálpti stjóranum á skipasmiðjuni við einum báti, sum stjórin sjálvur átti.

# Ósemja hóttir øll sum eiga hús

**Ein ósemja ímillum tryggingina og myndugleikarnar hevur kroyst øll, sum búgva í egnum bústaði, upp í ein krók**

TRYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein ósemja ímillum tryggingarfeløgini og myndugleikarnar hóttir nú við at geva øllum, sum eiga hús, ein fíggjarligan lúsing av teimum stóru.

Ósemjan tók seg upp, eftir at samgongan broytti mvg lógina juli í fjør.

Fyrr var tað so, at mvg varð ikki kravt av arbeiðslønum í sambandi við nýbygging ella umvæling av egnum húsum.

Men í juli í fjør var lógin broytt, so at mvg nú eisini skal betalast av arbeiðslønum í sambandi við nýbygging og umvæling av egnum bústaði.

Men so kann húsaeigarin søkja um at fáa mvg endurgoldið úr landskassanum.



*Ein avgerð, sum undanfarna samgonga tók síðsta summar, hevur sett nógvar húseigarar og handverksmeistarar í eina klemnu og endin kann vera, at tað fer at verða munandi dýrari at tryggja sín egna bústað*

*Savnsmynd*

### Rokningar aftur í høvdið

Men hendan avgerðin hjá undanfarnu samgongu, hevur sett bæði sethúsaeigarar og tryggingarfeløg í eina stóra, fíggjarliga klemmu.

Og tað er eisini her, at ósemja tekur seg upp ímillum tryggingarfeløgini og almennu myndugleikarnar, sum eru Taks í hesum føri.

Tryggingin vil nevniliga ikki betala mvg av arbeiðslønunum, tá ið tryggingarskaðar verða umvældir, hóast mvg nú eisini skal betalast av arbeiðslønunum.

Tryggingin vísir nevniliga til, at húsaeigarin fær mvg endurgoldið frá Taks.

Men hinvegin er tað nyttuleyst hjá húseigarum at søkja Taks um at fáa mvg av arbeiðslønunum endurgoldið, tí tað vil Taks ikki.

Taks er nevniliga av teirri áskoðan, at tryggingin skal eisini betala mvg og at endurgjald fyri mvg av arbeiðslønum verður ikki latið fyri tryggingarskaðar.

Hendan ósemjan ímillum tryggingingina og Taks hevur ført við sær, at nógvir húsaeigarar eru komnir í eina fíggjarliga klemmu.

Teir handverkarar, sum hava umvælt tryggingarskaðar síðani í juli í fjør, hava fingið greið boð frá tryggingini um, at tá ið rokningin verður send tryggingini, skal mvg av arbeiðsløn ikki teljast upp í.

Teir handverkarar, sum hava sent tryggingini rokningar við mvg av arbeiðsløn, hava fingið tær aftur í høvdið við boðum um at broyta rokningina og at taka mvg av arbeiðsløn burtur úr.

### Handverkarin við svartiperi

Men mvg skal betalast undir øllum umstøðum og so er bara eitt hjá handverkarunum at gera og tað er at fara til húsaeigaran við mvg rokningini.

Betalir húseigarin rokningina, nyttar onki hjá honum at biðja um endurgjald frá Taks, tí har siga tey nei.

Men hetta hevur eisini gjørt nógvar húsaeigarar so firtnar, at teir noktað blankt at betala mvg.

Teir siga, at teir hava tryggjað húsini fyri fult virðið og tí skulu teir eisini hava skaðan fult endurgoldnan.

Og so stendur handverksmeistarin eftir við svartiperi og eini mvg rokning, sum hann ongastaðni hevur at senda.

Sum skilst verður arbeitt fyri at finna eina loysn á málinum, men enn er ómøguligt at siga nakað sum helst um antin ein loysn verður funnin, hvør ein loysn kann verða, men sum tað sæst í aðrari grein her á síðuni, kann tað eisini enda við, at tað fer at verða munandi dýrari at tryggja sín egna bústað.

# Kann gerast munandi dýrari at tryggja sethús

**Ein ósemja ímillum tryggingina og landsmyndugleikarnar, kann í ringasta føri enda við, at tað verður munandi dýrari at tryggja sethús**

TRYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er vandi fyri, at tað verður munandi dýrari at tryggja sín egna bústað.

Tað kann verða avleiðingin av eini ósemju sum hevur tikið seg upp ímillum tygginginga og Taks.

Í hinari greinini her á síðuni sæst, at tlaan er um eina eina ósemju, sum tók seg upp í juli í fjør, tá ið mvg lógin varð broytt, so at mvg nú eisini skal betalast av arbeiðslønum í sambandi við nýbygging og umvæling av egnum bústaði.

### Tryggingarskaðar undantiknir

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá Tryggingarfelagnum Føroyum og frá Taks, tí har hava tey røttu fólkini ikki verið at hitt í morgum.

Men tað skilst, at bæði tryggingarfeløgini hava somu áskoðan á hesi viðurskifti.

Og Christian Andreasen, løgfrøðingur, sum arbeiðir við málinum fyri Trygd, sigur, at

Tryggingarfeløgini hava ásett tryggingargjøldini eftir tí veruleika, sum hevur verið galdandi.

Og tann veruleikin er, at mvg skal ikki gjaldast av arbeiðslønum.

- Men í juli og fjør varð lógin broytt, so at fult mvg eisini skal gjaldast av arbeiðslønum.

Hinvegin kann húsaeigarin fáa mvg av arbeiðslønum endurgoldið frá Taks.

- Men Taks hevur boðað frá, at tá ið talan er um tryggingarskaðar, verður endurgjald ikki latið fyri mvg av arbeiðslønum. Grundgevingin er, at her er ikki talan um umvæling fyri egnu rokning hjá húsaeigaranum, tí tað er tryggingarfelagið, sum umvælir.

### Munandi dýrari

Christian Andreasen sigur, at verður hetta endaliga støðan, verður tað sjálvandi væl dýrari hjá tryggingarfeløgunum at tryggja egnan bústað hjá fólki.

- Í ringasta føri kann tað elva til, at tryggingargjøldini fara at hækka.

Men enn eru ikki allar søgur syftar.

- Trygd hevur boðað frá, at vit eru ósamd við Taks, tí tað er ikki tryggingin, sum umvælir skaðan, men tað er tryggingartakarin sjálvir og tí hevur hann krav upp á at fáa mvg endurgoldið.

- Harafturat stendur ongastaðni, at tryggingarskaðar eru undantiknir og tí halda vit, at tulkingin hjá Taks, er beinleiðis skeiv.

### Fleiri ár

Í løtuni hevur Trygd reist okkurt mál, sum í løtuni verður ført sum eitt prinsippmál. Tað merkir, at endaliga úrslitið av hesum málunum, verður avgerðandi fyri, hvussu øll slík mál, skulu viðgerast.

Men tað kunnu ganga fleiri ár, áðrenn ein endalig avgerð er tikin, tí vandi er fyri, at tað skal ígjøgnum alla rættarskipanina, heilt í landsrættin.

Í løtuni er málið til viðgerðar í kommunalu skattakærunevndini.

Útlit eru til, at taparin fer at leggja málið fyri landsskatta kærunevndina og eftir tað, kann tað eisini henda, at málið endar í Føroya Rætti og haðani kann tað so enda heilt í landsrættinum, áðrenn ein endalig niðurstøða fyriliggur.

Hinvegin væntar Christian Andreasen, at dregur tað út at finna eina endaliga loysn, fer Trygd eisini at átaka sær mvg av arbeiðslønum, so at tryggingartakarin sleppur av krókinum. Men so verður tað aftur eitt mál ímillum Trygd og Taks.

- Men verður endaliga úrslitið at kærumálinum, at endurgjald ikki skal latast fyri mvg av arbeiðsløn í sambandi við tryggingarskaðar, má tryggingin sjálvandi átaka sær tað eisini, tí grundreglan í eini trygging er, at tryggingartakarin skal verða skaðaleysur.

Men so verður tað nógv dýrari hjá tryggingini at umvæla skaðar og so er vandi fyri, at tryggingarnar verða dýrari.